TVØROYRAR KOMMUNA

# Størv á Dagstovninum Mýrifípan í Trongisvági

Vit søkja eftir einum pedagogi til vøggustovuna 30 tímar um vikuna, frá 2.januar 2008. Starvið er eitt avloysarastarv fyri pedagog í farloyvi, fyribils til august 2008. Um ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.

Søkt verður eisini eftir einum tímaløntum avloysara, ið kann avloysa á barnagarðsstovunum og Útibarnagarðinum, tá tørvur er á tí.

Endurlýsing eftir einum pedagogi ella ergoterapeuti til stuðulstoymið 30 tímar um vikuna. Starvið verður sett 15. novembur ella eftir nærri avtalu.

**Stovnslýsing:**
Mýrifípan er ein dagstovnur í Tvøroyrar Kommunu. Her ganga 72 sera fitt børn í aldrinum 0-7 ár. 20 dugnalig starvsfólk arbeiða á stovninum. Stovnurin er skipaður í 5 eindir; vøggustova, tvær barnagarðsstovur, útibarnagarður og stuðulstoymið. Í stuðulstoyminum arbeiða í løtuni ein pedagogur, 30 tímar um vikuna, og ein fysioterapeutur, 20 tímar um vikuna.

Vit arbeiða undir Sosialu Deild í Tvøroyrar Kommunu og samstarvskommununum hennara, Hvalba, Sandvík, Fámjin og Sumba. Gott samstarv er við aðrar fakbólkar, so sum serráðgeva, heilsufrøðing og talulærara. NSR-tænastan í Suðuroy byrjar í næstum eisini.

Stuðulstoymið tekur sær fyrst og fremst av børnum við serligum tørvi, harnæst er tær/tey ráðgevandi og vegleiðandi fyri foreldur og starvsfólk.

**Vit vænta, at tú:**
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevnir; skalt samstarva við starvsfólk, foreldur og aðrar fakbólkar
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Er liðalig/-ur, vísir gleði og áhuga í arbeiðinum
- Megnar at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum
- Hevur góðan hug at vera úti, hevur virðing fyri náttúruni og megnar at geva tað víðari til børnini.

**Stuðulstoymið: harafturat skal tú**
- Duga at gera virkisætlan fyri hvørt barnið sær, við serligum tørvi, og arbeiða miðvíst eftir hesum.
- Hava vilja og áhuga í at dagføra tína fakligu vitan.
- Duga væl at orða teg munnliga og skrivliga.

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunufelagið, ella við avvarðandi fakfelg.

Meira fæst at vita um størvini, við at venda sær til Guðruna Petersen, leiðara tlf: 372700

Umsókn, saman við prógvi og viðmælum, skal sendast til Dagstovnin Mýrifípan, Smærugøta 8, FO-826 Trongisvágur, innan 8. novembur 2007, kl 12.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

# Barnaeksem – nýggj vitan

Michael Heidenheim yvirlækni innan húðsjúkur og Christine Westergaard sjúkrarøktarfrøðingur við servitan innan húðsjúkur, hava fyrilestur um barnaeksem, týskvøldið 6 . november 2007 kl. 18.00 í Gestaborðstovuni á Landssjúkrahúsinum.

Øll áhugað eru vælkomin. Avmarkað luttakaratal.

Tekning innan fríggjadagin, 2. november 2007, kl. 12.00

Áhugað kunnu senda teldupost til Edith Vang lsediva@ls.fo ella til Karis Thomassen lskarwe@ls.fo

Eisini ber til at ringja á telefon 304500, lokal 6222 ella 6221.

**Húðambulatoriið á Landssjúkrahúsinum**







FØROYA HANDILSSKÚLI

# Lærarar í Marknaðarførslu til FHS

**Søkt verður eftir lærara ella lærarum til hesar tímar í Tórshavn:**

Galdandi vikur við ólíka numrum

| Tíð | Týsdagur | Mikudagur | Fríggjadagur |
|---|---|---|---|
| 10.00-11.30 | F3 | F3 | F4 |
| 12.10-13.40 | F4 | | |

Galdandi vikur við líka numrum

| Tíð | Týsdagur | Mikudagur | Fríggjadagur |
|---|---|---|---|
| 10.00-11.30 | F4 | | |
| 12.10-13.40 | F3 | | F4 |
| 14.00-15.30 | | F3 | |

Starvið er tíðaravmarkað frá 6. november 2007 til 26. juni 2008.

**Løn:**
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálráðið.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 5. november 2007 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sonju Oyrabø Petersen ella Olav Absalonsen á telefon 317177, teldupostur: sp@hsh.fo ella oa@hsh.fo.

**Føroya Handilsskúli**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn
Tel 317177 · Fax 313374 · www.fh.fo

# PARKERINGARANSARI

Eitt hálvtíðarstarv sum parkeringaransari í Klaksvíkar kommunu er leyst at søkja.

Arbeiðið kann verða lagt millum kl. 08.00 og kl. 22.00.

Starvið verður lønt samsvarandi lønarflokki 2 á 1. stigi í Starvsmannafelagssáttmálanum, eins og vaktargjøld verða latin fyri arbeiði eftir kl. 17.00 yrkadagar og um vikuskifti.

Umsøkjarin skal í minsta lagi vera 25 ára gamal og hava góða heilsu.

Umsóknin skal innihalda nærri upplýsingar um umsøkjaran eins og starvsroyndir.

Læknaváttan til vanligt koyrikort og møgulig viðmæli skulu liggja við umsóknini.

Umsóknin verður at senda landfútanum áðrenn 19. november 2007.

FØROYA LANDFÚTI
Smyrilsvegur 20, Postboks 3018,
110 Tórshavn,
tann 15. oktober 2007

Karen Marie Olesen

